

MAZDA E 2200 VØRUBILUR

**Skrásetingarnr:** VR 886 **Km:** 120.000
**Árgangur:** 12.10.2001

**Kr. 68.000,-**



MAZDA 6 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** EL 469 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 16.09.2005

**Kr. 184.000,-**



YARIS 1,0 H/B 5D MMT TERRA V/K — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TL 180 **Km:** 38.500
**Árgangur:** 09.08.2004

**Kr. 112.000,-**



MAZDA 626 2,0 TDI — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SV 702 **Km:** 213.000
**Árgangur:** 10.11.1998

**Kr. 64.000,-**



AVENSIS 1,8 1C0 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LD 542 **Km:** 176.725
**Árgangur:** 22.10.2003

**Kr. 165.000,-**



YARIS 1,3 LUNA 5D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JD 240 **Km:** 10.441
**Árgangur:** 04.04.2007

**Kr. 158.000,-**



AVENSIS 1,8 SOL AUT SED — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK891 **Km:** 67.000
**Árgangur:** 23.03.2004

**Kr. 190.000,-**



COROLLA 1,3 SEDAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DT 976 **Km:** 126.911
**Árgangur:** 09.06.1999

**Kr. 54.000,-**



COROLLA 1,8 VERSO VAN 5D

**Skrásetingarnr:** HF 200 **Km:** 67.800
**Árgangur:** 06.02.2003

**Kr. 104.000,-**



VW VENTO GL BENSIN V/ BREKI

**Skrásetingarnr:** F 51.961 **Km:** 132.000
**Árgangur:** 19.07.1995

**Kr. 14.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.


# Marian Guttesen gott ummæli í Gaffa

**Nýggja fløgan hjá Mariu Guttesen fær fýra stjørnir av seks í tónleikatíðarritinum Gaffa**

Sambært ummælaranum á Gaffa leggur stílurin á fløguni "Wide Open" seg tætt at Tina Dickow, meðan íslendska Bjørk týðiliga ikki er fremmand fyri Mariu Guttesen.

Kortini hevur Maria Guttesen sítt heilt egna úttrykk við sínum bleyta og streingjandi vokali, verður sagt.

Samanumtikið lýsir ummælarin Mariu Guttesen sum eina songkvinnu, ið er á tremur við ambitiónum, vilja, hjarta og ikki minst evni til at fáa tónleikin at flóta lættliga frá síni egnu sál til okkara.

Maria Guttesen hevur eini serlig evni at fáa sín tónleik at flóta frá síni egnu sál til lurtarans, sambært ummælara á Gaffa, sum gevur fløguni fýra av seks møguligum stjørnum.

**ave**



*Tónleikurin flýtur lættliga frá sálini hjá Mariu Guttesen til lurtarans, verður sagt í ummæli av "Wide Open" í tónleikatíðarritinum Gaffa*

# 07 Vestur fingið búmerki

**Búmerkið og nýggju leikbúnarnir hjá nýstovnaða fótbóltsfelagnum 07 Vestur vórðu avdúkað fríggjadagin**

BÚMERKI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fitt av fólk var komið saman á Hotel Vágum, tá nýstovnaða fótbóltsfelagið, 07 Vestur fríggjadagin almannakunngjørdi búmerkið, leikbúnar og heimasíðu felagsins.

Tað skrivar nýggja heimasíðan hjá felagnum, sum er at finna á *www.07vestur.fo*, og sum Knassar hava sniðgivið.




*Páll Joensen úr Miðvági hevur teknað búmerkið hjá nýstovnaða fótbóltsfelagnum 07 Vestur*
*www.joanisnielsen.fo*

### Vinnarar

Herfyri skrivaði felagið út kapping um at tekna búmerki til 07 Vestur. Millum tey 15 uppskotini, sum komu inn, valdi nevndin uppskotið hjá Páll Joensen úr Miðvági at vera búmerkið hjá nýggja felagnum. Fyri avrikið fekk Páll Joensen handaðan ferðaseðil fyri tvey frá Atlantic Airways.

Somuleiðis fekk vinnarin av navnakappingini, Jim Sonny Guttesen, gávukort fyri uppskotið til navnið hjá felagnum, 07 Vestur.

Á samkomuni fríggjadagin vístu fýra leikarar eisini nýggju leikbúnarnar hjá felagnum, sum eru svartir við appelsingulum tali á rygginum.

# Brúkarasending í Sjónvarpinum

**Mánakvøldið 31. mars byrjar brúkaratátturin RIST í sjónvarpinum. Talan er um fimtan minuttir við brúkaratilfari hvørt mánakvøld, sum ein partur av Degi & Viku. Tað eru Georg L. Petersen og Bjarnheðin í Hoyvík, sum leggja til rættis**



SJÓNVARP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Eingin brúkari í Norðurlondum er so illa vardur sum tann føroyski. Tað vilja vit gera nakað við. Okkara endamál er at vera teirra amboð, um tey kenna seg órættvíst viðfarin. Vit seta okkum í teirra stað og veita eina tænastu. Tí er tað eisini av stórum týdningi, at fólk venda sær til okkum við teirra málum á teldupostadressuni rist@kringvarp.fo .

Soleiðis sigur Georg L. Petersen í tíðindaskrivi frá Kringvarpinum um nýggju brúkarasendingina RIST. Hann sigur, at tey eisini koma við góðum ráðum um ymisk vanlig viðurskifti - tað kann vera hvussu ein best heingir kjøtið, steikir búffin, velur rætta vínið ella okkurt heilt annað.

- Tátturin hevur fingið heitið RIST - vit kunnu rista í brúkaramálum, sálda tað góða frá tí ringa, rista lógarverkið, rista fólk sum ikki virða brúkaran og so framvegis, sigur Georg L. Petersen, sum saman við Bjarnheðin í Hoyvík leggur sendingina til rættis.